StÍF-Kyndil 26-23(11-12)

# Strandingar koppaðu oddaliðnum

**Tey vóru neyvan mong, sum høvdu roknað við, at StÍF fór at koppa oddaliðnum Kyndil í fyrsta dystinum í endaspælinum**

HONDBÓLTUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Strandingar hava ikki víst tað stóra hondbóltsspælið í grundspælinum, og tá ið teir so í fyrsta dystinum í endaspælinum fingu vitjan av Kyndli, sum vann grundspælið og helst eisini higartil í kappingini hevur víst tann besta hondbóltin, vóru tað neyvan mong, ið høvdu vænta stórvegis úrtøku burtur úr dystinum til StÍF. Men ikki gongur altíð sum prestur prædikar.



*Heldur óvæntað noyddust kyndlamenn at lúta fyri strandingum á Skála sunnudagin í fyrsta dystinum í endaspælinum*

*savnsmynd*

## Skerdir kyndilsmenn

Talan var um ein serstakliga spennandi og javnan dyst á Skála sunnudagin, hóast sjálvt hondbóltsspælið ikki var tað stóra at reypa um. Liðini fylgdust at kalla allan dystin, og viðhvørt vóru strandingar á odda, og aðrar tíðir vóru tað so føroyameistararnir úr Kyndli, sum høvdu leiðsluna.

Tað kom dátt við hjá Kyndli, at teir heilt tíðliga í dystinum mistu landsliðsleikaran Høgna Klein, sum meiddi sær annan fótin illa. Tá ið vit seint sunnukvøldið frættu frá kyndilsmonnum, søgdu teir, at tað sá einki serligt út hjá Høgna, og at hann verður ikki við aftur fyrstu dystirnar. Við missinum av Høgna misti Kyndil samstundis eina av sínum størstu skothóttanum.

Sum áðurnevnt var sjáldan nakar serligur munur millum liðini bæði. Kyndilsmenn fingu als ikki glið á spælið hjá sær, og ferð aftaná ferð gjørdu teir óneyðug mistøk, sum strandingar vóru dugnaligir til at revsa. Ikki minst var ungi landsliðsleikarin Sveinur Justinussen hjá StÍF sera væl upplagdur sunnudagin, og hann gjørdist eisini toppskjútti hjá heimaliðnum við níggju málum.

Tað er neyvan ov nógv sagt, at dysturin sunnudagin var ein tann vánaligasti hjá føroyameistarunum í hesum kappingarárínum, og tá ið StÍF bleiv við at hanga í Kyndli, fekk hetta eisini frustratiónirnar fram á útiliðnum.

## Stríðsviljin sigraði

Eftir at Kyndil hevði verið á odda við einum máli í hálvleikssteðginum, gekk tað framvegis javnt á eftir steðgin. Fyrsta partin av seinna hálvleiki var á odda við einum ella tveimum málum, men tá ið seinni hálvleikur var hálvrunnin, komu strandingar ájavnt við gestirnar, sum samstundis blivu enn meiri skerdir.

Seinni hálvleikur var akkurát hálvrunnin, tá ið sterki strikuspælarin hjá Kyndli, Janus Einar Sørensen, fekk reyða kortið. Alexandur Johansen var á veg gjøgnum verjuna hjá havnarliðnum, men Janus Einar fekk armin um kvika vongspælarin hjá strandingum, men armuruin var so mikið ovarlaga, at hann fór um hálsin á Alexandur, sum fór ógvusligani um koll. Dómararnir báðir, Dánjal og Kári Hansen, vóru eirindaleysir og vístu Janus Einari reyða kortið.

Hetta var ein týðandi løta í dystinum, og tað var júst eftir henda tilburð, at StÍF aftur kom á odda í dystinum, og tað eydnaðist ongantíð aftur Kyndli at koma ájavnt við heimaliðið, sum vann dystin 26-23.

Í stuttum kann sigast, at strandingar sunnudagin vístu tann eyðkenda stríðsviljan, sum teir eru kendir fyri, men hinvegin var ikki tað stóra hondbóltsspælið at sígga, sum vit annars vita, at bæði liðini eru før fyri at spæla.

Kyndil hevði ein av sínum heilt vánaligu døgum, og um teir ætla sær at gera nakað við vestmenningar í fyrru hálvfinaluni sínamillum í Coca-Cola kappingini, sum verður á Hálsi mikukvøldið, so skulu teir taka annað skinn um bak. Vestmenningar eru væl fyri, og tá ið so Kyndil samstundis noyðist at verða bæði Janus Einar Sørensen og Høgna Klein fyriuttan, tykist uppgávan ómetaliga trupul.

Strandingar skulu eisini spæla hálvfinalu mikukvøldið. Tá verður talan um eina endurtøku av finaluni frá í fjør, sum strandingar vunnu á hoyvíkingum. Um søgan fer at endurtaka seg í ár, skal verða ósagt, men við sigrinum á Kyndli sunnudagin, er lítið at ivaast í, at StÍF hevur fingið vind í segluni, og tá ið tað er, so kunnu strandingar basa øllum liðum í Føroyum.

### StÍF-Kyndil 26-23 (11-12)

StÍF: Sveinur Justinussen 9, Leivur Justinussen 6, Bent Djurhuus 3, Alexandur Johansen 3(1), Borgar Danielsen 2, Bárður Danielsen 2, Pauli G. Hansen 1
Kyndil: Jacob Jónsson 5, Josef Abrahamsen 5, Hans Áki Dahl-Christiansen 5, Ragnar Stakksund 2, Rókur Akralíð 2, Finnur Hansson 2, Hans A. Thomsen 1, Høgni Klein 1
Brotskøst: StÍF 2(1)
Útvísingar: StÍF 3, Kyndil 5
Reytt kort: Kyndil 1
Dómarar: Kári Hansen og Dánial Hansen

Kyndil-Neistin 20-33(12-18)

# Avgreiðslusigur í grannauppgerð

**Hóast Kyndil fylgdi væl við í fyrra hálvleiki, so gjørdist talan kortini um ein trivaligan sigur til Neistan, tá ið grannadystur var í Havn í Sunset-kappingini**

HONDBÓLTUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ikki óvæntað vunnu neistakvinnur ein tryggan sigur á grannunum úr Kyndli sunnudagin. Neistin sær út til at verða tað liðið, sum kann geva teimum báðum oddaliðunum báðum, Stjørnuni og VB, størstu mótstøðuna, meðan Kyndil er eitt av avgjørdu botnliðunum, og tí var úrslitið av dystinum sunnudagin ikki ringt at spáa um.

## Kyndlakvinnur fylgdu væl við

Størsta partin av fyrra hálvleiki var tað tó ikki nógv, ið bendi á, at Neistin skuldi vinna væntaða stórsigurin. Gamaní løgdu tær seg á odda tíðliga í dystinum, men tað gekk heldur striltið við at fáa lagt sjógv millum seg og Kyndil hjá neistakvinnunum.

Hvørjar ferð Neistin hótti við at fara frá Kyndli, svaraðu tær grønu aftur, men tá ið fyrri hálvleikur fór at halla, fekk Neistin avgerandi leiðsluna, ið sløkti seinastu vónirnar hjá Kyndli um at fáa stig burtur úr dystinum.

Seinastu fimm minuttirnar av fyrra hálvleiki økti Neistin úr 14-12 upp í 18-12, og so var dysturin avgjørdur.

Í seinna hálvleiki helt Neistin fram við at økja um leiðsluna, og ikki kann sigast annað, enn at tað sær heilt gott út hjá teimum bláu úr Havn, sum til tíðir sunnudagin vístu heilt gott spæl.

Við teimum trimum sentralu spælarunum á liðnum, Marjun Tróndarson, Simonu Petersen og Ásu á Neystabø á odda, kann Neistin verða liðið, sum fer at seta fót fyri gulldreymunum hjá antin Stjørnuni ella VB.

Næsta uppgávan hjá Neistanum verður tó ikki í Sunset-kappingini, men í Coca-Cola steypakappingini, har Neistin í annaðkvøld skal spæla fyrru hálvfinaluna móti Søljuni. Kyndil er ikki longur við í steypakappingini.

### Kyndil-Neistin 20-33(12-18)

Kyndil: Randi Wardum 9(1), Anja Midjord 4, Ann Mari Wang 4, Linda Weihe 1, Súsanna Petersen 1, Kari-Ann Petersen 1
Neistin: Marjun Tróndarson 8, Simona Petersen 8(5), Ása á Neystabø 5, Kára á Dunga 4, Unn Kragesteen 3, Annika Thomsen 3, Jórun Ludvig 1, Lív Sørensen 1
Brotskøst: Kyndil 3(1), Neistin 6(5)
Útvísingar: Kyndil 2, Neistin 2
Dómarar: Brandur Johansen og Heri Petersen